# al skapa samanhang



*Hví ikki innrætta baðirúmið á ein hátt, sum fær gestirnir at smílast, spyr 36 ára gamla Mette Ditmer, danskur designari*

lívligu litir og ofta stuttligu design. Sjálv sigur hon, at hon serliga ofta letur seg inspirera av humor. Design kann gott vera stuttligt og fáa fólk at smílast, heldur hon og sipar til sína nýggju røð av seingjarklæðum og baðirúmslutum við Tom og Jerry figurum.

- Eg fekk loyvi at brúka nakrar av upprunaligu skitsunum av Tom og Jerry, sum hava ein heilt serligan skálkaliga neista, sum tú ikki kanst lata vera við at smílast at, sigur Mette Ditmer, sum ikki heldur ráhvít handklæði vera nakað serligt at flenna eftir.

- Fyllir tú hinvegin hillarnar við lilla og grasgrønum handkløðum ella letur Tom jagsta Jerry á baðimáttunum, gevur tú heilt sikkurt gestunum okkurt at tosa um – og smílast at, heldur Mette Ditmer.

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Seinnu árini hevur Mette Ditmer eisini lagt seg aftir at designa seingjarklæði í sama einfalda og litríka sniði*

## Ditmer og tey kongaligu

Í 2001 fekk Mette Ditmer eina uppringing frá einum handli í Norra. Handilin hevði júst fingið ein fyrispurning frá norska kongshúsinum um baðirøðina hjá Ditmer í sambandi við umbygging av summarslottinum. Úrslitið varð, at kongshúsið keypti 12 sett av baðirøðini til øll baðirúmini á slottinum, og harvið gjørdist Mette Ditmer "kongaligur hovútvegari" – ein søga, sum serliga amerikansk sølufólk halda vera stuttliga

*Kelda: fpn.dk/boligtrend*